## UTTAN ÚR HEIMI



## Við báti at ringja

*Vatnflóð er nógvastaðni í Evropa, og nógvastaðni standa gøturnar undir í vatni. Tað kann krevja sítt av hugflognum. Hesin maðurin í Beograd hevur flotað sær bátin at vita, um telefonin virkar.*

# Norðurírar fingið síðstu freist

**Kann norðurírska tingið ikki semjast um at skipa eina stjórn innan seks mánaðir, missa tinglimirnir lønina.**

NORÐURÍRLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Stjórnirnar í London og Dublin hava nú mist tolið við norðurírum og hava givið teimum knívin á barkan. Semjast teir ikki um at skipa stjórn innan 24. november, verður alt tos um norðurírskt sjálvsstýri lagt til viks.

Katolikkarnir og protestantarnir í Norðurírlandi samdust í 1998 um at velja eitt sjálvsstýristing, men tann skipanin helt bara til 2002. Bretska stjórnin gjørdi tí av at leggja landslutin undir beinleiðis stýri úr London, og soleiðis hevur tað verið síðani.

Í gjár kunngjørdu teir báðir forsætisráðharrarnir, Tony Blair og Bertie Ahern, at teir hava lagt eina ætlan um, hvussu valdið av nýggjum skal býtast ímillum teir báðar bólkarnar í Norðurírlandi. Sjálvsstýristingið, sum ongan fund hevur havt seinastu trý árini, verður kallað saman í næsta mánað, og málið er, at ein nýggj stjórn skal skipast innan seks vikur. Tey flestu vænta tó, tinglimirnir fáa brúk fyri allari tíðarfreistini, sum er tann 24. november.

Blair og Ahern hava gjørt greitt, at norðurírar fáa ikki fleiri møguleikar, og tinglimirnir í Belfast verða beinleiðis hóttir við tiltøkum, kemur einki burturúr. Kunnu tinglimirnir ikki semjast um at skipa eina felags stjórn innan 24. november, fáa teir onga løn, og so verður Norðurírland stýrt úr London og Dublin.

Eygleiðarar siga seg tó ivast í, at hetta fer at trýsta teir báðar norðurírsku partarnar til semju. Sinn Fein vil hava eina stjórn, sum skal virka fyri veruligum norðurírskum sjálvsstýri. Tí taka protestantarnir ikki undir við, og teir vilja heldur ikki í stjórn saman við Sinn Fein.

# Ætlaði at skjóta Stoltenberg

**Fyri einari viku síðani ringdi ein maður til forsætisráðharraskrivstovuna í Oslo og segði, at hann ætlaði sær at skjóta Jens Stoltenberg, foræstisráðharra.**

OSLO
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nú hevur løgreglan tikið mannin. Sambært Aftenposten hevur hann viðgingið, at tað var hann, sum hótti við at skjóta forsætisráðharran. Um orsøkin skal maðurin hava sagt, at hann er misnøgdur við, at forsætisráðharrin er ímóti av lække skrásetingargjaldið á prutlum.

Sambært Aftenposten eru fleiri norskir politikarar hóttir við lívinum tey seinastu árini. Fíggjarmálaráðharrin, Kristin Halvorsen, og forkvinnan í Framburðsflokkinum, Siv Jensen, hava fingið serliga trygdarútgerð frá løgregluni eftir drápshóttanir. Fyrrverandi forsætisráðharrin Kjell Magne Bondevik varð eisini hóttur við lívinum, skrivar blaðið.

## Ov fáir læknar í heiminum

Fáa vit eina heimsumfatandi umfarssótt, fara heilsuverkini at fáa stórar trupulleikar, tí tað eru alt ov fá starvsfólk til at taka sær av teimum sjúku. Í veruleikanum er longu trot á læknum, sjúkrasystrum og øðrum heilsustarvsfólki, og tað ger millum annað, at altjóða samfelagið er ikki ført fyri at steðga lívshættisligum sjúkum so sum eyðkvæmi, sigur ST.

– Fólkatalið í heiminum veksur, men tey, sum arbeiða innan heilsuverkið, fækka í tali og serliga í teimum økjunum, har tørvurin á teimum er serliga stórur, sigur aðalskrivarin í WHO, Lee Jong-work, og leggur afturat, at sum er er tørvur á meiri enn fýra milliónum heilsustarvsfólkum kring heimin.

Tørvurin er serliga stórur har suðuri og har eysturi í Asia og í teimum afrikonsku londunum sunnan fyri Sadara. Júst har er vandin fyri umfarssjúkum størstur, og kemur ein tílík sjúka har, fer tað at leggja heilsuverkini í teimum einstøku londunum fullkomiliga lamin, sigur Lee Jong-Work við AP.

Í teirri seinastu ársfrágreiðingini hjá WHO stendur eisini, at nógvastaðni eru heilsuverkini so illa mannað, at tey megna ikki tær uppgávur, sum ein brádlig náttúruvanlukka hevur við sær.

## Persson krevur endurgjald



*Gøran Persson krevur endurgjald.*

Svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, hevur nú stevnt flogfelagnum Ryanair, tí felagið brúkti eina mynd av honum og fyrrverandi uttanríkisráðharranum Lailu Freiwald í einari blaðlýsing.

Flogfelagið hevði ikki spurt tey bæði um loyvi at brúka myndina, og herfyri sendi forsætisráðharrin Ryanair eina rokning, men felagið sýtti fyri at gjalda. Nú hava hann og Laila Freiwald stevnt felagnum eftir 75.000 svenskum krónum í endurgjaldi í part, tí tey kenna seg misbrúkt.

Lennart Kanter, sum er sakførari hjá Persson og Freiwald, sigur við Aftonbladet, at tað er eingin ivi um, at Ryanair hevur brotið svensku lógina um myndanýtslu og sølu.

## Royndu at smugla

Tollvaldið í Russlandi vil vera við, at nøkur starvsfólk á norsku umboðsstovuni í Murmansk hava roynt at smugla nakrar virðismiklar málningar úr Russlandi til Noregs, skrivar Dagsavisen.

Russisk lóg sigur, at tað er ikki loyvt at fara av landinum við listarverkum uttan at siga tollvaldinum frá, men tað gjørdu starvsfólkini á norsku umboðsstovuni ikki, tá tey ætlaðu sær um markið við 15 málningum. Norðmenn umbera seg við, at tað er eitt savn í Tromsø, sum eigur málningarnar, og at savnið skuldi hava teir aftur, eftir at teir hava verið á einari framsýning í Murmansk.

Men russar halda fast um, at málningarnir skulu tollavgreiðast fyrst, og teir hava tí lagt hald á teir. Tað er ikki greitt enn, hvørja revsing starvsfólkini á umboðsstovuni kunnu fáa.

## Verða ikki rend út

Í USA eru republikanararnir og demokratarnir komnir ásamt um eina lógarbroyting, sum fer at hava við sær, at teir nógvu ólógligu innflytararnir í USA sleppa at verða verandi í landinum.

Amerikonsku myndugleikarnir meta, at umleið 12 milliónir fólk eru komin ólógliga inn í landið, og at tað tí er ein vónleys uppgáva at finna tey og at reka tey av landinum. Tí hava teir báðir politisku flokkarnir tingast um at broyta verandi lóg.